3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

Kular Røtur

Túsund Smíl

Hundurin brúni á ellisheimi, gentan sum er totalt up to date og drongurin sum heldur vil hava friturufeitt enn fisk.

Kular Røtur 2 er eitt sindur av hvørjum.

Fyri ta› mesta er tónleikurin spældur í tí›arandunum, men pláss er eisini fyri einum farra av fólkatónleiki og gemenum poppi. Og lat ta› vera sagt beinanvegin, at Kular Røtur 2 er ein verdugur uppfylgjari til fyrru fløguna, sum var so fram úr væl móttikin og framvegis ver›ur nógv spæld.

Hesafer› er ta› kanska eitt sindur minni magiskt, enn tá Vera og Bilurin hjá okkum drøna›u inn á fløgumarkna›in, men Kular Røtur konsepti› hevur biti› seg fast. Ta› riggar, børnunum dámar ta›, og eisini tey vaksnu fáa naka› burturúr.

Grundarlagi› undir øllum eru yrkingarnar og løgini, sum Steintór Rasmussen og Ingi Isaksen eiga meginpartin av, og fyri ta› mesta eru sangirnir á n‡ggju útgávuni gó›ir.

Millum skeringarnar goymir seg eisini lítla meistaraverki› Kingoson. Ein framúr sangur vi› einum frálíkum lagi og yrking, har Steintór Rasmussen, samstundis sum hann skrivar ein lættan tekst til børnini, fær eitt sindur av sosialrealismu til tey vaksnu vi› í yrkingina. Kanska er ta› ikki hundurin brúni, sum endar á ellisheiminum, men hesin sangurin er á hædd vi› tann tiltikna sangin fra fyrst í 80'unum.

Sangurin Flippan er eitt rættiligur floorfiller, sum ta› ver›ur rópt á diskoteksmálinum. Ein sangur sum svingar og rættiliga kann fanga. Og gjøgnumgangandi hoyrist, at tónleikurin er í trá› vi› nógv av tí, sum annars er at hoyra úr útlandinum í hesum døgum. Kular Røtur 2 er moderna› og ungt. Ta› er ein barnaføga, men eisini ein ungdómsfløga.

Sangirnir Kræsin og Kalla meg Babe eru frálíkir. Væl yrktir og vi› tveimum frálíkum løgum hjá Inga Isaksen, og punktumi› á fløguni er ein flottur sangur um árstí›irnar.

Sangirnir um abbabeiggjan og skúlan eru irriterandi, men ta› eru bara tvær av 11 skeringum. Størsti parturin av sangunum standa mát vi› ta›, sum fyrra fløgan leg›i upp til, og enn eina ver›a bæ›i tónleikur og sangur framførd sannførandi.

Vi› avrikinum á hesi fløguni í huga, eigur einki at standa í vegin fyri, at ein tri›ja fløga vi› Kulum Rótum eisini ver›ur gjørd.

Men tá er Kingoson helst farin, stakkalin...

Iron Maiden



Brave New World

So hendi ta› endiliga : The beast is back! Hjá okkum gomlu 80´ara heavyrockarum er tann ná›uga stund follin okkum í lut at vit sleppa at uppliva eina samstundis nostalgiska og aktuella løtu vi› eini n‡ggjari fløgu í hendi. Mong vóru vit sum í 1995 avskriva›u Iron Maiden tá i› teir hetta ári› góvu út fløguna The X Factor. Einki gott kann sigast um hesa fløguna : Rætti Iron Maiden sangarin var skiftur út vi› tann nasala og ótolandi Blaze Bailey.

Ikki nokk vi› at rætti Iron Maiden sangarin, Bruce Dickinson, er komin upp í aftur bólkin ; eisini gamli guitarleikarin, sum r‡mdi í 1989, Adrian Smith, hevur funni› sær vegin aftur í gamla sessin. Ùrsliti› er ein gle›isfyltur heavy metal rúsur vi› einum torubrakandi ljó›múri sum spríkir av nittum og tonsarayvirfló›. Fyrsta stakfløgan, The Wicker Man, hevur longu gjørt um seg á sølulistunum, eisini í Føroyum. Lagi› f‡kur avsta› vi› 200 km/t, komplett vi› galopp - bassi og har›mæltum harrakóri - hári› er langt og le›urjakkin glansar av hart rockandi stadionsveitta. Hetta er hjartanemandi.

Ikki sí›ani 1982 hevur kongarøddin hjá Bruce ljó›a› so yndislig og gjøgnumtreingjandi. Hetta var tí›in tá i› or›ini "six six six" brendu seg føst í trummuhindurnar á einum hvørjum rætt rockandi og slamdansandi heavy metal enfant terrible. Hetta er eisini besta útgávan hjá Maiden sí›ani Seventh Son Of A Seventh Son, sum gjørdi at undirrita›i konvertera›i á vári í 1988. Frá at hava nynna› vi› til Kim Wilde og Chicago fekk eg stafettina handa›a og ta› var tamba›a torurøddin á Bruce Dickinson sum kveikti ein loga í mítt titrandi popphjarta.

Henda fløgan er før fyri at halda eldinum vi› líka og ta› kann man takka løgum so sum The Mercenary, Out Of The Silent Planet, Brave New World og The Nomad fyri. Stílurin er ey›kendur og integriteturin l‡sur av bólkinum. Løgini eru styrkt vi› vanligu melodisku millumspølunum og Iron Maiden hava umsí›ur fingi› skil upp á trummuljó›i›. Nicko McBrain leikar í sum tann svakligi berserkarin hann altí› hevur veri› og Bruce Dickinson er í toppformi. Steve Harris stendur framvegis vi› ró›ri› og hevur skriva› bró›urpartin av tilfarinum á fløguni. Spelkna guitar trio´in slær ikki falskar mentir og vælsignar løgini vi› øllum frá teskandi yndi til brølandi ø›i og undirrita›i tveitir seg enn einafer› í dusti›.

Hetta er ikki eitt ummæli, hetta er eitt vi›mæli. Keyp! Keyp! Keyp!

Malan Ey›unsdóttir



Malan

Saman vi› Eivør Pállsdóttir man Malan Ey›unsdóttir vera Føroya besta poppsangarinna, ongin ivi um ta›. Ta› hevur hon longu veri› í fleiri ár og oftast hevur hon veri› sett í samband vi› Mark No Limits, sjálvt um hennara leiklutur í hesum bólki var sterkt avmarka›ur. Nú hava vit so høvi til at uppliva Maluna einsamalla, uttan nakran Teitur at krógva seg aftan fyri.

Úrsliti› kann ikki sigast at vera anna› enn sera sannførandi ; Malan hevur eina flotta og stóra rødd, sum tó kortini ongantí› gerst átro›kandi ella snjøll at lurta eftir. Hennara fyrsta roynd sum einstaklingur er henda fløgan, sum fyri ta› mesta er upptikin ni›ri í Danmark. Ta› er Kári Jacobsen sum er oddama›ur fyri hesi verkætlan, sum ikki kann sigast at vera anna› enn imponerandi hondverk. Stílurin á sjálvari fløguni er poppur, slætt og rætt. Júst sum vi› fløguni hjá hinari Maluni, sum kom út í marts mána›a, er dentur lagdur á eina reina og ógrugguta studioframlei›slu har forritarnir eru vavdar saman vi› vanligan akustiskum ljó›førum, so sum akustiskum guitarum og ditto trummum.

Kári Jacobsen hevur skriva› øll løgini á fløguni. Fleiri av hesum løgum hava veri› nógv at hoyrt í útvarpium, so undirtøkan tykist at vera til sta›ar fyri hesum produktinum; sæ› sum ein føroysk tónleikaútgáva er fløgan fult á hædd vi› naka› anna› sum er útkomi› hesi seinastu árini, innan sama tónleikastíl. Løgini Minnist Tú Hitt Summari› og Tá Ein Genta Saknar Sín Drong mugu sigast at vera trumfarnir á fløguni. Eisini er eitt ávíst hittpotentiali at hóma í løgunum Dagur Ì Mei og Hev›i Eg Bara Tora›.

Kortini eru onnur løg á fløguni sum tykjast at sakna eitt sí›sta spark í afturpartin; her er alt ov líti› flog yvir heildarmyndini sum í stórum tykist í so gumputung og óuppløgd. Sí›sta pifti› manglar og summi av løgunum hava trupult vi› at festa seg í minni›. Millum hesi eru Inn Til Tín, À Berum og Dreymurin. Hetta sí›sta leggur seg kraftiga í reyvina á latín bylgjuni sum í løtuni skolar inn yvir Europa, vi› Ricky Martin og Enrique Iglesias á odda, men í hesum sambandinum skurrar ta› eitt sindur. Tropiski pulsurin hevur onki vi› føroysk vi›urskifti ella tekstliga innihaldi› at gera og fellur vi› einum bumsi í gólvi›.

Sí›sta lagi› á fløguni, Túsund àr, leggur seg eisini ikki sørt smagleyst upp at einum eftirhondini útlúgva›um mótafyribrigdi: Millennium - feprinum. Hetta er ikki júst ta› mest vi›komandi ella aktuella nú vit eru komin inn í juni mána›a 2000. Fólk eru komin fyri seg aftur og teldufrø›ingarnir hava sessast aftur.

Annars er ni›urstø›an hon, at Malan ikki noy›ist at blúgvast vi› hesa útgávuna, sum sigast má at vera ein tann mest spennandi higartil í ár. Men ein seinasta lítil ávaring : Haldi› tykkum langt vekk frá jakzac lagnum Sorgblítt Hjarta.

Argjamenn síggja altíð aftur á hinar

8–mannafør: *Argjabáturin hevur higartil verið so sannførandi, at teir eru væl á veg at vinna FM heitið, sum teir mistu í ólavsøkuróðrinum í fjør*

Tey, sum eru áhugað í kapproðri, og serliga tey, sum halda við Argjabátinum, komast væl við, tá mint verður á, hvussu kappingin millum áttamannaførini í fjør endaði. Argjabáturin hevði vunnið FM bæði í 1997 og í 1998. Í fjør skuldi hann vinna FM steypið til ognar. Tað lá so mikið væl fyri, at ólavsøkuróðurin var avgerandi fyri, hvør fór at vinna FM. Argjabáturin endaði á triðja plássi, og so struku grannarnir umborð á Ørvi avstað við meistaraskapinum. Tað var eitt stórt vónbrot.

Í ár hilnast væl betri hjá Argjabátinum. Teir vunnu sannførandi á norðoyarstevnu, og aftur á Skálafjørðinum var eingin ivi um, hvat tað stinnasta áttamannafarið var.

Rúni Johannesen er bátsformaður umborð á Argjabátinum. Hann ásannar, tá vit bera tað upp á mál fyri honum, at higartil hevur hann so at siga alla tíðina í báðum FM róðrunum sæð aftur á manningarnar á hinum bátunum.

– Eg siti á bógbekki í bakborð. Bæði á norðoyarstevnu og nú á Eystanstevnuni hava vit fingið góðan start, og vit hava líka sum kent tað soleiðis, at vit so at siga alla tíðina í báðum róðrunum hava havt tak á kappingini.

Kappingin

Tað gekk ein løta, áðrenn Argjabáturin rættuliga sleit seg leysan av hinum bátunum. Startspurturin var fínur hjá fleiri bátum. Toftabáturin, Gullbrandur og Nevið Reyða vóru væl við, men tað var skjótt, at Argjabáturin hevði fingið hálvan skutin framum hinar, og longu tá bátarnir komu á eitt túsund metra málið, var Argjabáturin so at siga leysur av hinum bátunum.

Merkisvert var tað, hvussu langt aftastur Heiðabáturin var. Teir løgdu inn meiri enn eina ferð, áðrenn teir komu á mál. Umborð á Knørri tóktust teir heldur ikki at vera í serliga góðari venjing. Oyndri, Kvívíkingur og Miðvingur hava áður vunnið nógv, men í ár tykjast teir hava ilt við at blanda seg í kappingina millum teir næstfremstu. Avrikini hjá øllum hinum hava higartil boðað frá, at tað verður sera torført at gera nakað við Argjabátin. Tá áttamannaførini komu á mál, var Argjabáturin meiri enn leysur av teimum næstfremstu. Toftabáturin vann ta kappingina móti Gullbrandi, sum er mannaður við vestmenningum. Teir umborð á Gullbrandi fingu gula kortið undir róðrinum. Tað gjørdu teir, tí teir ikki tóku boðini frá høvuðsdómaranum til eftirtektar beinanvegin.

Stórur áhugi

Nógv argjafólk vóru í neystinum leygarkvøldið, tá Argjabáturin við manning og viðhaldsfólkum komu aftur av Skálafjørðinum. Øll fingu smyrjibreyð og drekkamunn.

– Vit høvdu roknað við og vónað, at tað fór at ganga væl á Skálafjørðinum. Líkindini vóru umleið tey somu, sum tey vóru í Klaksvík. Ta ferðina vóru vit ikki vísir í, at tað fór at hilnast so væl, sum tað gjørdi. Ein maður fór av stutt undan norðoyarstevnu, men tíbetur vísti hetta seg ikki at vera til so stóran ampa. Vit fingu ein mann umborð, sum áður hevði luttikið nógv í kapproðri, og tað hevur roynst væl, staðfestir Rúni Johannesen, bátsformaður á Argjabátinum.

Á Argjabátinum eru fýra umborð, sum eisini róðu við í fjør. Stýrimaðurin er spildurnýggjur í kappróðraverðini. Hinir fýra hava áður róð við bátum hjá Havnar Róðrarfelag. Onkur hevur verið við Gongurólvi, og onkur hevur áður verið umborð á Havnarbátinum.



Myndin er frá norðoyastevnu, men úrslitið er hitt sama. Argjabáturin fór einsamallur um málið á eystanstevnu

savnsmynd

Helvtin av teimum, sum manna Argjabátin, eru argjamenn.

Manningin á Argjabátinum fór fyrstu ferð í ár umborð á bátin 20. apríl. Teir høvdu frammanundan runnið í nakrar vikur. Higartil hevur tað víst seg, at fyrireikingarnar hava verið nóg dyggar til hetta kappróðrarárið. Teir báðir fyrstu róðrarnir hevur úrslitið verið so mikið gott, at alt bendir á, at Argjabáturin fer at endurvinna FM heitið, sum teir vunnu bæði í 1997 og í 1998, men sum teir á ólavsøku í fjør mistu til Ørv hjá Havnar Róðrarfelag.

jh

Frúgvin fekk Tjaldrið undir liðina

5–mannafør gentur: *Hesa ferð vóru bátarnir úr Vágum ikki so einaráðandi, sum teir vóru í fyrstu FM kappingini*

Á norðoyarstevnu var tað merkisvert, at allir teir tríggir fremstu bátarnir í kappingini millum genturnar komu úr Vágum.

Frúgvin úr Miðvági vann aftur á eystanstevnuni, og aftur hesa ferð var nýggi báturin leysur av øllum hinum, tá hann fór um málið. Ørnin úr Sandavági var triðji báturin um málið í Runavík. Ørnin vann eisini bronsuplássið í Klaksvík.

Munurin í teimum báðum fyrstu kappingunum millum gentur var, at meðan Beinta úr Miðvági var næstfremst í Klaksvík, so heilkiksaði hesin báturin úr Miðvági leygardagin. Beinta endaði á áttanda plássinum. Tað var púra óvæntað.

Tjaldrið fekk munin betri start á eystanstevnuni, enn genturnar úr róðrarfelagnum NSÍ fingu á norðoyarstevnu. Guli báturin var beinanvegin við í kappingini um oddaplássini, og har helt hann seg.

Tá hálvur teinurin var rógvin, var Frúgvin tvær bátslongdir undan øllum hinum, men munurin gjørdist ongantíð størri enn tað. Ørnin royndi at vinna seg inn á Tjaldrið í kappingini um næstfremsta plássið, men tað eydnaðist ongantíð av álvara. Tjaldrið var á málinum leyst av aftaru bátunum.

Í 1999 vann Havfrúgvin FM. Higartil í ár hevur tað skorist vánaliga. Hesa ferð endaði Havfrúgvin á sjeynda plássinum, og avrikini higartil hava als ikki boðað frá, at vestmannagentur fara at vera við í kappingini um FM.

Miðvágsbáturin, Frúgvin, tykist hava fult tamarhald á støðuni. Tað er ilt at ímynda sær nakran annan FM vinnara enn Frúnna, og tað er ilt at ímynda sær nakran annan vinnara av nøkrum róðri enn Frúnna. Men nú skulu vit ikki taka avgerðirnar frammanundan at tað hevur verið róð. Komandi leygardag verður kappast í Vági, og tá fáa vit fyrstu staðfestingina av, um Frúgvin hjá miðvingum er so sannførandi, sum vit í hesi frásøgnini hava gjørt hana til. Men vit hava ikki kunnað gjørt annað. Úrslitini hava talað fyri seg!

jh

Hinar bátsmanningarnar kunnu ikki gera nógv annað enn hyggja at, tá róð verður móti Frúnni
Mynd: J. Jacobsen